# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Norðuratlantisk mentanarnátt í Odense

**Fimta septembur verður mentanarnátt í Odense, men tiltakið byrjar longu fyrsta við framsýningum. Úr Føroyum verða Eydna Hestbæk og Anna Katrin Egilstrøð við á tiltakinum, við ávikavist myndlist og sangi**

MENTAN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tiltakið byrjar longu fyrsta septembur í ráðhúshøllini í Odense. Ætlanin við tiltakinum, er at varpa ljós á norðuratlantisku kvinnuna. Tiltakið byrjar framsýning við Ingu Rún úr Íslandi, Naju Abelsen úr Grønlandi og Eydnu Hestbæk úr Føroyum. Framsýningin verður frá fyrsta til fimta september. Evnið í framsýningini er tann norðuratlantiska kvinnan, og allar tríggjar listakvinnur hava havt framsýningar í øllum trimum londum í danska kongaríkinum.

Fríggjadagin, fimta september, verður sjálvt mentanarnáttin, og hon verður eisini hildin í ráðhúshøllini í Odense. Á skránni verða frásagnir og konsertir, har Ingibjørg Gisladottir fer at fortelja sagnir. Stinne Jacobsen og Sequssuna Olsen fara at spæla Grønlendskan tónleik. Stinne Jacobsen hevur harumframt skrivað barnabøkur og gjørt filmstónleik til grønlendska marknaðin.

## Øll umboðaði

Tað er Grønlandshúsið í Odense, ið skipar fyri tiltakinum, og málið er at savna vilja og fígging til eitt Norðuratlantiskt Hús á bryggjuni í Odense, sum ætlandi skal savna føroyingar, íslendingar, grønlendingar og danir á einum stað til mentanarlig tiltøk. Norrøna Felagið verður á staðnum, og fara fólk hagani at greiða frá um londini í Norðuratlantshavi.

## Valravn

Á skránni verður eisini Valravn, sum er bólkur, ið hevur spælt á bæði G! og Roskilde. Anna Katrin Egilstrøð av Eiði er forsangari í bólkinum og hinir limirnir í bólkinum eru Christopher Juul, Søren Hammarlund og Martin Seeberg, sum allir eru danir. Seinasti limurin í bólkinum er Juan Pino, ið er úr Sveits og Ekvador. Valravn spælir við ymiskum ljóðførum og sangi ymiskar tulkingar av sagnum, kvæðum og táttum, ið eru ein partur av norðuratlantiska mentanararvinum. Eisini spæla tey egin løg. Tað mesta verður sungið á føroyskum, men eisini syngja tey á donskum og íslendskum.

- Vit eru við til tiltakið, tí tey hava ringt til okkum. Men eg haldi tað verða deiligt, at tey varpa ljós á norðuratlantisku kvinnuna, samstundis haldi eg tað vera gott, at tey í Odense royna at fáa eitt Norðuratlantiskt Hús, sigur Anna Katrin Egilstrøð.



*Á skránni verður eisini Valravn, sum er bólkur, ið hevur spælt á bæði G! og Roskilde. Anna Katrin Egilstrøð av Eiði er forsangari í bólkinum*




**M/B Knúkaberg TG 126 til sølu**

Báturin er sera væl útgjørdur til línu- og snelluveiðu. Báturin hevur bankaloyvið.

**Tlf. 21 61 26**








ÚTBJÓÐING

## Ellis- og røktarheimið og Økisdepilin fyri sinnisveik í Vági

Við hesum verður arbeiðið at gera Ellis- og røktarheimið og Økisdepilin fyri sinnisveik í Vági boðið út í almennari lisitatión sum høvuðsarbeiðstøka.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
- høvuðsbygning í 3 hæddum, í alt góðar 3100 m²
- lutvíst samanbygdar íbúðir, í alt 664 m²
- lendisarbeiði og parkeringsøki (jørðarbeiðið og høvuðskloakkin eru gjørd.)

Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi 1. okt. 2010.

Lisitatiónin verður:
**hósdagin 9. okt. 2008 kl. 14.00**
hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, 100 Tórshavn.

Ástaðarfundur verður:
**hósdagin 25. sept. 2008 kl. 11.45.**
Møtt verður á staðnum við Vatnið í Vági.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast við at venda sær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78
FO-110 Tórshavn
Tel. 54 08 54
hdl@lv.fo

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað móti veðhaldi, til støddar kr. 5.000, ið verða at flyta á konto 134.228.4 í Eik Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina, t.e. 16. okt. 2008.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herímillum tyrlupallar.*